

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 03 - 2013

# Eingin orsøk at óttast kinesararnar

Ongum nýtist at stúra fyri kinesiskum íløgum ella kinesiskum arbeiðsmonnum í Grønlandi. Hesi greiðu orð koma frá grønlendska jarðfrøðinginum og professaranum Minik Rosing í einari samrøðu við Berlingske Business. Hann leggur tó afturat, at tað er ikki skeivt at vera stúrin og at hugsa seg væl um. -Vit skulu finna útav, hvussu vit kunnu stýra teimum til fyrimun fyri bæði Grønland og Danmark, sigur Minik Rosing, sum er valdur til formann í einum nýskipaðum serfrøðingabólki, sum grønlendska landsstýrið og lærdi háskúlin í Keypmannahavn hava mannað. Grønlendski professarin sigur, at Grønland skal ikki vera ein oyggj, sumn kinesarar ikki skulu hava atgongd til, og hann er sostatt samdur við landsstýrinum í Nuuk, sum í fleiri ár hevur dyrgt eftir at fáa kinesarar at gera íløgur í Grønlandi. Kinesarar eisini aðrastaðni -Í fjølmiðlunum verður serliga kjakast um, hvussu vit kunnu sleppa undan kinesarunum. Men Kina hevur ein fjórðing av heimsins íbúgvum og er í ferð við at gerast tann største búskapurin í heiminum, vísir Minik Rosing á og minnir samstundis á, at Í Kanada hava tey havt stórt gagn av nýggjum kinesiskum íløgum. Millum annað hevur Kina gjørt íløgur fyri nakrar milliardir krónur í námsvinnu í tí kanadiska partinum av Arktis. Harafturat hevur Kina gjørt íløgur Avstralia, sum er eitt annað land við stórari námsvinnu, og loksins hava kinesarar gjørt stórar íløgur í fleiri londum í Afrika. -Myndugleikarnir í Kanada hava framvegis eftirlit við, hvat hendir, tá kinesarar gera íløgur í olju- og námsvinuna har, og tað er royndum sum hesum Grønland og Danmark skulu læra av, sigur Minik Rosing við Berlingske Business.